# Vistfröðilig framleiðsla

# Nýskapan í matvörulandbúnaði

# Kunning um TÚN

# Vistfröðilig framleiðsla:

**Framtíðarleiðin**

Handil við nýtsluvörum eyðkennist nú av öktum krövum um reinleika, heilsusemi og föðsluvirði. Samstundis vilja fleiri og fleiri vita við vissu at vöran, ið tey nýta kemur úr heilsugevandi umhvörvi og er framleidd í sátt við náttúruna. Hetta hevur havt við sær, at vistfröðiligar atferðir hava vunnið sær sess í landbúnaði og matvöruídnaði. Víða um heimin eru stöðugt fleiri, ið skilja tíðarinnar kall, umskipa sítt samskifti við umhvörvið og fara undir vistfröðiliga framleiðslu.

Fyri eina tjóð, ið grundar sína tilveru á nýtslu av tí livandi tilfeingi ið finst í sjógvi og á landi, veitir vistfröðilig framleiðsla áhugaverdar möguleikar til nýskapan í vinnulívinum.

Brúkarar  í Vesturlondum hava nú möguleika at keypa matvörur, smyrsl, heilivág, heilsubótarevni, klædnavöru, töð og annað, sum er framleitt á vistfröðiligan hátt. Marknaðarförsla av vistfröðiligum úrdráttum er grundað á at, ein lutleysur persónur skilmarkar krövini, tekur sær av eftirliti og váttar at tey settu krövini verða hildin.

**Vistfröðiligur landbúnaður**

Vistfröðilig atferð merkir, at vöran verður framleidd og skapað á ein hátt ið styrkir lívríkið, ökir um möguleikan til endurnýtslu, og ger, at nýtsla av vöruni hevur jaliga ávirkan á heilsustöðu brúkarans, og at burturkast av nýggjum kann falla inn í umhvörvið uttan at dálka.

Vistfröðilig dyrkan er grundað á fruktagóða og livandi jörð:

- Skiftisdyrkan í staðin fyri stöðuga dyrkan;
- nýtsla av lívrunnum töðum;
- dyrkan av smæru og lupin til at framleiða kövievni;
- fjölbroytni í dyrkan og nýtsla av náttúrligari vernd ímóti illgresi og skordýrum;
- friðing og uppdyrking av viðkvæmum gróðrarökjum.

Vistfröðiligt neyta- og seyðahald er grundað á at tryggja vælferðina hjá djórunum:

- Nýtsla av vistfröðiligum fóðurevnum;
- eftirlit við, at beitilendið ikki ovtyngist;
- rúmlig og turr hús við nöktandi legurúmd;
- umstöður til útiveru og náttúrligan atburð;
- góð rökt og fóðring til at fyribyrgja sjúkum.

## Framleiðsla av vistfröðiligum ráevnum

Viðferð og framleiðsla av vistfröðiligum ráevnum er knýtt at ávísum reglum til tess at varðveita eginleikar teirra, so væl sum til ber, líka frá uppruna og til brúkarin fær tey í hendurnar:

- Úrdráttir verða latnir brúkarum í so feskum og upprunaligum standi, sum gjörligt er;
- vistfröðiliga vunnir úrdráttir verða hildnir atskildir frá öðrum úrdráttum, á öllum stigum í framleiðslu, pakking og flutningi;
- nýtsla av eykaevnum og blandievnum verður hildin innan fyri strong mörk;
- hóvlig nýtsla av pakkitilfari og gjöllig vörumerking;
- skipað skráseting og vörumerking, so allar upplýsingar um úrdráttin eru atkomuligar.

## Eru vistfröðiligir úrdráttir dýrari?

Tey ið nýta vistfröðiliga framleiðslu, velja hana ofta fram um aðrar tí at tey:

- Vilja hava tryggari matvörur;
- eru tilvitað um umhvörvismál;
- halda vistfröðiligar úrdráttir vera heilsusamari og smakkbetri;
- leggja dent á at djórini fáa góða viðferð;
- vilja styðja ábötur í landbúnaðinum.

Prísurin á vistfröðiliga vunnum úrdráttum er vanliga nakað hægri enn á öðrum úrdráttum. Hetta er millum annað orsakað av, at dyrkan av teimum tekur longri tíð, og úrtökan er minni. Við at velja vistfröðiligar úrdráttir og gjalda eitt sindur hægri prís, eggja brúkararnir bóndunum til at ganga betur um landið og dyrka uttan handilstöð, uttan heilivág ímóti illgresi og soppum, uttan skordýraeitur, uttan vakstrarhormon og uttan arvabroytingar. Samstundis skerja teir tann óbeinleiðis kostnað, ið vanabundnir dyrkanarhættir og evnisnýtsla hava við sær fyri samfelagið.

Váttan um vistfrøði – Tað ið  framleiðarar og brúkarar hava at miða seg eftir.

Marknaðarförsla av vistfröðiliga vunnum úrdráttum er treytað av at ein viðurkend váttanarstova hevur tikið sær av regluligum eftirliti við teimum ígjögnum alla gongdina, frá dyrkan og framleiðslu til pakking. Ein váttan gevur báðum pörtum álit á hvörjum öðrum í handilsviðurskiftum, tí at hon tryggjar, at vöran, ið sögd er at vera vistfröðilig, er framleidd sambært skilmarkaðum krövum.

Váttanarstovan tekur sær av eftirliti við vistfröðiligari framleiðslu. Váttanin skal verða viðurkend her á landi eins og uttanlands.

## Váttað vistfröðiligt

Váttanarmerkið er ein vegvísi hjá brúkarum: Vörur við slíkum merki eru framleiddar á vistfröðiligan hátt. Váttanarstovan starvar sambært eini altjóða góðskuáseting ið tryggjar, at hvört mál fær fakliga og álítandi viðferð av skikkaðum persónum.

Ein váttan frá váttanarstovuni er týdningarmikil hjá bóndum og fyritökum í sambandi við vörumenning og marknaðarförslu og stuðlar teirra leið til bötta umhvörvisstýring.

Í Íslandi er tað váttanarstovan TÚN,  sum er góðkenningar-stovnur

Váttanarstovan TÚN arbeiðir við nýskapan í íslendskari matvöruframleiðslu í samsvari við altjóða ásetingar um  vistfröðiliga framleiðslu.

Megintættirnir í tænastuni hjá TÚN eru hesir:

- Útgáva av upplýsingartilfari
- Handbók um dyrkan og framleiðslu
- Kunningarfundir og privatar viðtalur
- Eftirlit, váttan og umsjón við nýtslu av váttanarmerkinum

Váttanarstovan TÚN er grundað á samstarv ímillum böndur, fyritökur, bygdarráð og felög fyri brúkarar og handlar. Váttanarkervið hjá TÚN er gjört í samstarvi við kendar útlendskar váttanarstovur og í samsvari við íslendska lóggávu og staðbundin viðurskifti. TÚN er virkin luttakari í fleirtjóða samstarvi ímillum sambæriligar stovnar og felagsskapir. TÚN hevur tikið stig til menningarverkevni í samstarvi við vísindamenn, stovnar og framleiðarar á ymsum ökjum, t.d. um viðferð av beitilendi, fiskaaling og nýtslu av villum urtum og djórum.

Samstarv um vistfrøðisligar reglur er knýtt ímillum Ísland, Grønland og Føroyar. Tað eru MBM og Bóndafelag Føroya, sum eru føroysku umboðini. Ætlanin er í fyrstu atløgu at kunna føroyska landbúnaðin um hesi viðurskifti.

Tilfar um góðkenning og ymiskar framleiðslur er týtt til føroyskt og fæst við at venda sær til omanfyri nevndu felagskapir.

Danska Plantediroktoratet hevur eisini gott yvirlit yvir vistfrøðiligar reglur á donskum máli.